# Verkætlanarleiðsla í landsfyrisitingini



## Leistur og vegleiðing

(hefti 2)

Lagt til rættis hava:

**Heini Hátún, Rúni Rasmussen, Nicolai M. Balle og Heri Joensen**

**Mai 2014**

# Verkætlanarleiðsla í landsfyrisitingini

## Leistur og vegleiðing

Mai 2014

**Verkætlanarleiðsla í landsfyrisitingini (hefti 2)**

Útgevari: Føroya landsstýri, mai 2014, www.tinganes.fo

Uppseting og prent: Føroyaprent, www.foroyaprent.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# INNIHALD


Inngangur . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 7

**1. VERKÆTLANARARBEIÐI** . . . . . . . . . . . . . 8

Leiklutir . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 9

Verkætlanarskipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . 10

Verkætlanarstjørnan . . . . . . . . . . . . . . . . . 11

**2. VERKÆTLANARLEIÐSLUFRYMILIN** . . . . . . . 12

TEINAR . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 14

Teinur 1: Stigtøka . . . . . . . . . . . . . . . . . 15

Teinur 2: Fyrireiking . . . . . . . . . . . . . . . . 16

Teinur 3: Byrjan . . . . . . . . . . . . . . . . . . 17

Teinur 4: Fremjing (útinning) . . . . . . . . . . . . 18

Teinur 5: Endi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 19

VERKÆTLANARLEIÐSLUUPPGÁVUR . . . . . . . . 20

Seta mál og stigskipa málini . . . . . . . . . . . . 21

Áhugalýsing . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 22

Váðameting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 23

Rótfesti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24

Leiðsla . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24

Skipan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25

Praktisk fyrireiking . . . . . . . . . . . . . . . . . 26

Startskotið . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27

Skoðan . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28

Útgreining . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29

Stýring . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30

Eftirmeting . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31

## INNGANGUR

Hesin bóklingur er vegleiðing til teirra, ið skulu leiða verkætlanir í landsfyrisitingini.

Talan er um ein projektleiðslufrymil ella ein leist til landsfyrisitingina.

Leisturin er ein stigvís mannagongd, ið vísir teinarnar í verkætlanum og uppgávurnar hjá eigara og verkætlanarleiðara. Leisturin lýsir ikki til fulnar tey amboð, ið verkætlanarleiðarar kunnu hava brúk fyri. Tað hevði verið ov víðfevnt, men týdningamestu amboðini og viðurskiftini eru lýst.

Leisturin vísir høvuðsteinarnar, ið allar verkætlanir fara ígjøgnum, og hvørjar uppgávurnar eru hjá verkætlanareigara og leiðara.

Ein annar bóklingur (Innleiðsla til verkætlanarleiðslu og ráð til ovastu leiðslu) lýsir ástøði í verkætlanarleiðslu og serligu viðurskiftini, ið galda fyri føroysku landsfyrisitingina og uppgávuna hjá ovastu leiðsluni. Lesarin kann hava gagn av at kaga í henda eisini.

Orðini verkætlan og projekt vera bæði brúkt hvørt um annað.

Bæði heftini eru tøk á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni (www.tinganes.fo)

Tórshavn 24. apríl 2014

**Stýrisbólkur:**
Marjun Hanusardóttir, formaður og eigari
Poul Geert Hansen
Turid Arge
Rógvi Reinert

**Verkætlanarbólkur:**
Heini Hátún, verkætlanarleiðari
Rúni Rasmussen
Nicolai M. Balle
Heri Joensen

# 1. VERKÆTLANARARBEIÐI

### Hvat er ein verkætlan?

Tað er menningaruppgáva, ið førir til nýggar tænastur, nýggj úrslit ella øðrvísi arbeiðsgongdir. Ein verkætlan skapar nýggj virði í samfelagnum. Uppgávan er avmarkað í tíð, arbeiðsorku og kostnaði.

Ein verkætlan kann fevna um fleiri deildir ella stovnar. Ein verkætlanarleiðari leiðir verkætlanina og hevur ábyrgdina av at fáa hana framda í verki.

Eitt annað eyðkenni fyri eina verkætlan er, at hon er bara fyribils – tá ið uppgávan er loyst, endar verkætlanin.

Vit kunnu siga, at ein verkætlan hevur eina lívsgongd. Og ymsir arbeiðshættir verða brúktir – alt eftir, hvar í lívsgongdini tú ert.

Í hesum bóklingi verður greitt frá teimum týdningarmestu viðurskiftunum í verkætlanararbeiði og verkætlanarleiðslu.

**Verkætlan**

Ein verkætlan er eitt átak, sum grundleggjandi hevur síni egnu mál, egnu tíðarkarmar, útreiðslur og góðsku og er eyðkent við síni serligu arbeiðsskipan.

Ein verkætlan er eitt átak, har tilfeingi, starvsfólk, tilfar og fígging er skipað á serligan hátt fyri at loysa eina serliga uppgávu, ið er nágreinliga lýst, hevur avmarkað tilfeingi og avmarkaðar tíðarkarmar, og sum fylgir einari fastari rás. Málið er at fremja positivar broytingar, ið samsvara við málslýsingina, ið bæði eigur at vera kvantitativ og kvalitativ. *(Allýsing frá IPMA)*

## LEIKLUTIR

### Verkætlanararbeiðið hevur hesar grundleiklutir í sær:

1) Eigaraskap og yvirskipaða leiðslu.

2) At útinna verkætlanarleiðslu.

3) At útinna fakarbeiði og umsiting.

### Ovasta leiðsla

Yvirskipaða leiðslan í einari verkætlan er formliga leiðslan á stovninum ella stovnunum, ið hava serligan myndugleika ella áhuga í verkætlanini. Yvirskipaða leiðslan í einari ávísari verkætlan er tann ella tey, ið taka avgerðir um at fara í gongd og hava ræði á kørmum, sum eru til taks í einum ávísum menningarátaki. Sama leiðsla hevur eisini størsta áhugan í, at nyttan og virðið av verkætlanini gerst veruleiki. Henda leiðslan eigur verkætlanina, og skal hon tryggja, at navngivin persónur verður settur sum eigari av verkætlanini. Eigarin hevur evstu ábyrgd.

### Í landsfyrisitingini er leiðslan:

- Aðalstjórar, ið hava ábyrgd av stjórnarráðum sum heild, taka stóru stigini og tryggja karmarnar.

- Deildarleiðarar við ábyrgd fyri serøkjum í ovastu landsfyrisitingini, ið kunnu standa fyri ávísum almennum stovnum.

- Stovnsleiðarar, ið standa fyri virkseminum á hesum stovnum.

Hvør, ið er yvirskipaða leiðslan í eini verkætlan er, veldst um hvørja verkætlan sær.

### Stovnsleiðari

Er talan um eina verkætlan, ið ein ávísur stovnsleiðari hevur fult ræði á og tekur stig til, er hesin stovnsleiðari yvirskipað leiðsla og eigari.

### Aðalstjórin í samstarvi við stovnsleiðslurnar

Í torgreiddum, tvørgangandi verkætlanum eru stigini til verkætlanina ofta tikin oman fyri einstøku almennu stovnarnar, og er yvirskipaða leiðslan tá at finna á hægri stigi. Tað er aðalstjórin, ið setur karmarnar um fleiri stovnar undir sama stjórnarráði. Er talan um tvørgangandi verkætlanir millum stovnar undir einum stjórnarráði, er aðalstjórin ovasta leiðslan í samstarvi við stovnsleiðslurnar.

### Avvarðandi aðalstjórar og stovnsleiðarar

Tað eru fleiri aðalstjórar, ið gera av karmarnar hjá hvør sínum stjórnarráði. Er talan um tvørgangandi verkætlanir, har fleiri stovnar undir ymsum stjórnarráðum eru við, er ovasta leiðslan avvarðandi aðalstjórar og stovnsleiðarar. Í hesari støðuni er torført at staðfesta ábyrgd.

Eigarin í ávísari verkætlan ella programmi nýtist ikki at vera ovasta leiðslan, sjálvur leikluturin kann leggjast út til annan navngivnan skikkaðan persón. Hetta er ofta neyðugt í hægsta stignum í landsfyrisitingini, har leiðslan hevur ov breiða ábyrgd at umsita einstakar verkætlanir. Tað er í torgreiddu verkætlanunum í landsfyrisitingini, at tað er avbjóðandi at taka støðu til eigaraskap og at manna ítøkiliga leiklutin.

## VERKÆTLANARSKIPAN

Ein vanlig verkætlanarskipan sær soleiðis út:




### Hesi leiklutir eru vanligir:

#### Eigari
Eigari er tann, sum biður um og eigur verkætlanina og stendur við evstu ábyrgdini. Skal vera navngivin persónur og umboða stovnin ella stovnarnar, ið hava ábyrgdina. Tekur stig, raðfestir og skapar karmar (fígging o.a.), allýsir málini, nyttuna og veitingarnar.

#### Stýrisbólkur
Tey, sum fíggja og allýsa verkætlanaruppgávuna, útvega karmar (pengar og tíð) og fylgja við gongdini.

#### Stýrisbólksformaður
Eigarin er ofta stýrisbólkaformaðurin. Leiðir stýrisbólkin. Hevur evstu ábyrgd av, at avgerðir verða tiknar. Helst í samráð við stýrislimirnar. Kann taka avgerðir í ivamálum. Í stýrisbólkinum eru limir, sum hava ávísar uppgávur til dømis góðskutrygging, fígging, umsiting o.a.

#### Verkætlanarleiðari
Leiðir og stýrir verkætlanini og verkætlanarbólkinum. Skal loysa uppgávuna, sum eigarin hevur biðið um, og sum samsvarar við verkætlanarstjørnuna. Verkætlanarleiðsla snýr seg ikki um at útinna verkætlanararbeiðið, men at leiða og gera tilgongdina sjónliga.

Tað kann vera ein avbjóðing at skyna á hesum viðurskiftum. Er talan um smáar verkætlanir, skal verkætlanarleiðarin eisini loysa uppgávuna. Tess størri og torgreiddari verkætlanin er, tess størri rúm eigur verkætlanarleiðarin at brúka til leiðslu.

#### Verkætlanarbólkur og luttakarar
Verkætlanarbólkurin eru tey, ið hava ábyrgd av at loysa uppgávuna. Luttakararnir hava ofta serligar uppgávur, til dømis kunning og samskifti, KT, góðskutrygging og fakliga ábyrgd.

#### Tilvísingarbólkur
Tey, ið hava áhuga í verkætlanini og hava virðismikla fakliga vitan. Gevur fakliga ella politiska sparring og íkast.

#### Undirveitarar
Fremja ítøkiligar uppgávur sambært sáttmála, útvega tilfar, ráðgeva og útvega útgerð.




## VERKÆTLANARSTJØRNAN

Verkætlanarstjørnan lýsir avgerandi samanhang í øllum verkætlanum og er týdningarmikið ráðleggingar- og stýrisamboð í verkætlanum.

Ein og hvør verklætlan byrjar, tí tørvur er á onkrari broyting. Verkætlanin skal enda við, at ætlaða nyttan fæst burtur úr.

Fyri at fáa nyttuna, skal okkurt mennast, og hetta verður gjørt fyri ávísan kostnað og innan ávísa tíð.

Øll hesi økini er knýtt at hvørt at øðrum. Verður eitt broytt, broytast hini eisini.

### Nyttan (effektmál)

Nyttan kann vera betri tænasta, betri góðska, størri inntøka, sparingar í arbeiðsgongdini, nøgdari viðskiftafólk. Nyttan er at skapa samfelagnum størri virði. Nyttan sæst vanliga eftir, at verkætlanin er liðug. Tað er ábyrgdin hjá leiðsluni at tryggja nyttuna ella effektina.

### Veitingarmál (leveransumál)

Veitingin er fyritreytin fyri, at ætlaða nyttan fæst burturúr, men er ikki nóg mikið. Undirtøka skal fáast millum brúkarar, og veitingin skal verða brúkt. Men tað eru veitingarnar, sum projektið skal framleiða, og verkætlanarleiðarin hevur ábyrgdina av tí.

Tað er avgerandi, at felagsfatan er um veitingina millum eigara, verkætlanarleiðara og verkætlanarluttakarar. Hvat væntar eigarin sær at fáa, hvat skal verkætlanarleiðarin gera, og hvussu skulu verkætlanarluttakararnir arbeiða. At knýta rætt samband millum nyttu og veiting er krevjandi, og tað er uppgávan hjá eigara og verkætlanarleiðara.

### Kostnaðir og tíðarætlan

Verkætlanarleiðarin metir neyvt um, hvat krevst fyri at gera veitingina. Her verður hugsað um førleikar, nøgd av starvsfólki, amboð og kostnað.

Við støði í hesari meting og øðrum treytum, verður ein tíðarætlan gjørd.

Oftan ber til at stytta tíðina við at seta meira tilfeingi til (fleiri starvsfólk, munadyggari amboð). Við hvørt ber ikki til, tí ytri umstøður binda tilgongdina.

Verkætlanarstjørnan skal verða havd í huga alla tíðina – í stigtakan, fyrireiking og fremjing. Er ósamsvar millum veitingar, tilfeingi (karmar) og tíðarætlan, verður galið, og mál og tilfeingi eiga at verða tillagað.

# 2. VERKÆTLANARLEIÐSLUFRYMILIN

Fyri at fáa einháttað arbeiðið við verkætlanum, verður ein projektleiðslufrymil brúktur. Frymilin vísir grafiskt og við vegleiðingum, hvat verkætlanarleiðari og eigari skulu gera, so hvørt sum verkætlanin gongur sína gongd.

Endamálið er at fáa yvirlit, felagsfatan og skipað arbeiðslag. At lætta um førleikamenning, samskifti og arbeiðsgongd yvirhøvur – at skapa ein samanhang.

Ofta verður blandað millum projektleiðslufrymil og projektfrymil. Projektleiðslufrymlar leggja dent á sjálva leiðsluuppgávuna, og teir galda, sama hvør verkætlanin er.

Ein projektleiðslufrymil vísir grafiskt og við vegleiðing leiðsluuppgávuna hjá eigara og verkætlanarleiðara so hvørt sum projektið mennist.

Slíkir frymlar verða oftani nýttir hjá fyritøkum og stovnum, sum vegleiðing fyri tey amboð, ið fyritøkan nýtir til sínar verkætlanir.

Verkætlanarleiðsla er ikki nágreinilig vísindi, og projektleiðslufrymlar eru ymiskir. Ymsir altjóða standardir eru, og ikki minst einstakar fyritøkur og stovnar hava sínar egnu mátar og sínar egnu tulkingar.

Tað týdningamiklasta hjá einum stovni ella samstarvsumhvørvi er at semjast um, hvønn týdning man leggur í sín projektleiðslufrymil.

Meginhugtøk innan verkætlanarleiðslu, ið tey flestu nýta, eru verkætlanarteinar og projektleiðsluuppgávur ella tilgongdir.

◆ Hugtakið varði (milestone) er stýriamboð og verður nýtt at lýsa støðuna í einari verkætlan, tá okkurt er liðugt. Tá ið ein ávísur teinur er liðugur, er verkætlanin komin til ein stórvarða. Vit eru eisini komin til ein varða, tá ið ein ávís projektleiðsluuppgáva er liðug. Undir sjálvari fremjingini eru ofta fleiri veitingar á leiðini móti høvuðsveitingunum. Hetta eru eisini varðar á leiðini at stýra eftir.

## VERKÆTLANARLEIÐSLUFRYMILIN






*Vanliga er fýra ella fimm teinar. Hetta eru vanligu teinarnir*

## TEINAR

Ein verkætlan kann verða býtt sundur í fleiri teinar frá tí, at hugskotið birtist til verkætlanin endar, og úrslitið fer víðari sum vanligur rakstur ella málsviðgerð.

Teinarnir vísa stigini, sum verkætlanin er í. Tá hvør teinur endar, kemur verkætlanin til ein stórvarða. Stórvarðin markerar nakrar avgerðir, eitt formligt umskifti hendir, og verkætlanin fer inn í eitt nýtt stig. Tá ið stigtøka og fyrireiking enda, kann eigarin (stýrisbólkurin) halda fram ella steðga verkætlanini.

Teinarnir geva leiðsluni ábending um teirra ábyrgd í mun til at taka avgerðir, at samskifta við projekt-leiðaran, at leiða og skapa karmar. Teinarnir geva verkætlanarleiðara og projektbólki upplýsing um teirra mandat og uppgávu.

Tá ið verkætlanin skiftir til ein nýggjan tein, hendir eitt skifti í sjálvum projektinum, ið merkist hjá luttakarum og setir sín dám á sjálvt arbeiðið. Í fyrsta teini, tá stig verður tikið til eina verkætlan, verða hugskot vend, tingini verða viðgjørd meira opið, alt kjakið er meiri opið, leiklutirnir eru ikki so fastlæstir. Á fyrireikingarteininum er ráðleggingin neyv, mett verður um alternativar møguleikar. Síðan verða fólk sett, og í fremjingini verður arbeitt móti málinum, osfr.



STIGTØKA ◆ FYRIREIKING ◆ BYRJAN ◆ FREMJING ◆ ENDI ◆

## TEINUR 1: STIGTØKA

Endamálið er at tryggja, at tú skilur hugskotið so væl sum til ber. Tað hevur týdning, at grundarlagið undir projektinum verður lýst soleiðis, at støða kann takast til, um projektið skal verða sett í verk, og komandi projektleiðarin hevur gott grundarlag at arbeiða víðari við.

### Eigaraskapur

Eigaraskapur verður staðfestur beinanvegin og festur á navngivnan persón. Hesin fær ábyrgdina av tilgongdini frameftir. Tað kann henda, at annar persónur fær ábyrgd sum eigari seinni.

### Verkætlanarstjørnan

Projektstjørnan vísir tey fýra økini, sum eru knýtt at einum projekti: Nytta, kostnaður, veitingar og tíðarætlan. Tá ið stig verður tikið til eitt projekt, skal verkætlanarstjørnan beinanvegin í miðdepilin. Øll fýra økini skulu vera greið. Yvirskipað verður mett um kostnað, fíggingarmøguleikar, tíðarætlan og onnur krøv.

Týðandi er beinanvegin at orða greið mál. Hvørjar veitingar eru neyðugar? Flestu verkætlanir kollsigla, um málini eru ógreið.

Tað er eisini umráðandi at gera av, hvussu stór verkætlanin verður.

### Áhugalýsing

Í fyrsta teini birtast teir fyrstu tankarnir til áhugalýsingina. Hvør er viðspælari, hvar er mótstøðan? Áhugalýsingin skal kortleggja, hvør áhugi er fyri ella í móti projektinum. Tað veri seg einstaklingar, bólkar, stovnar ella okkurt annað.

### Váðameting

Her verður fyrsta váðametingin eisini gjørd. Hvørjir váðar kunnu vera á leiðini. Ber ætlaða broytingin til?

### Projektskipan

Her verður hugsað um týdningarmestu leiklutirnar, hvøjir persónar eru tøkir og hvussu leingi. Hvørjar leiklutir kunnu tey ymsu fólkini hugsast at hava, og hvussu skal projektið skipast, so tað hóskar inn í høvuðsstovnin ella stjórnarráðið. Ikki er víst, at projektleiðarin longu er funnin.

### Endi

Teinur 1 endar við einum projektuppleggi, og støða verður tikin til, um farið verður undir projektið. Verður avgjørt at fara í gongd, so verður projektleiðari setur. Í summum førum verður ein projektleiðari settur, áðrenn 1. teinur er liðugur.

### Ábyrgd

Ovasta leiðslan hevur ábyrgd av at seta kósina, og tað er leiðslan, sum orðar málið.

STIGTØKA ◆ FYRIREIKING ◆ BYRJAN ◆ FREMJING ◆ ENDI ◆

## TEINUR 2: FYRIREIKING

Á hesum teininum skal greiða fáast á, hvat skal fremjast, og hvussu arbeiðið eftir ætlan verður framt. Tað merkir, at tú skal kanna eftir, hvat ber til, og at ovasta leiðslan og onnur viðkomandi taka undir við arbeiðsháttinum.

### Heimild

Verkætlanarleiðarin er settur og hevur heimild frá leiðsluni at fara í gongd og leiða arbeiðið. Verkætlanarleiðarin hevur fingið eitt projektupplegg, sum er grundarlagið undir arbeiðinum frameftir.

### Verkætlanarstjørnan

Arbeitt verður víðari við verkætlanarstjørnuni við fullari útgreining. Málini verða útgreinað. Hvat skal veitingin vera fyri at fáa ætlaðu nyttuna. Sambandið millum nyttu og veiting skal vera so ítøkiligt, sum til ber. Útgreinað fíggjarætlan verður gjørd, og tíðarætlan sett upp.

### Grundbygnaður

Grundbygnaðurin í projektgrundarlagnum verður alsamt ítøkiligari. Høvuðsveitingar og partveitingar vera ásettar. Áhugalýsing og váðameting verða dagførdar.

### Verkætlanarskipan

Verkætlanarorganisatiónin verður staðfest, stýrisbólkur, projektbólkur og leiklutirnir verða mannaðir, og stýrismannagongdir gjørdar. Samspælið millum eigara og projektleiðara byrjar í verki.

Er projektið stórt og torgreitt, hevur starvssetan og upplæring serliga stóran týdning.

Tørvur á undirveitarum verður staðfestur, og mannagongdir verða gjørdar fyri keyp og veitarastýring.

### Endi

Teinur 2 endar við, at eitt fullfíggjað verkætlanargrundarlag verður viðgjørt í stýrisbólkinum, og avgerð verður tikin um farast skal í gongd.

### Ábyrgd

Stýrisbólkurin er settur, og formaðurin, sum ofta er eigarin, hevur ábyrgd av at fylgja arbeiðinum. Tætt samstarv skal vera millum eigaran og verkætlanarleiðaran. Projektleiðarin hevur ábyrgdina av arbeiðinum í projektbólkinum.

STIGTØKA ◆ FYRIREIKING ◆ BYRJAN ◆ FREMJING ◆ ENDI ◆

## TEINUR 3: BYRJAN

Endamálið við teininum er, at tú fært møguleika at gjøgnumganga projektið í smálutum fyri stýrisbólki og projektbólki og greiða frá, hvussu tú ætlar at koma á mál og fáa undirtøku fyri verkætlanini.

### Fyrireiking

Klárt er at byrja, projektleiðslan veit, hvat skal gerast og kennir treytirnar.

Tað praktiska verður fyrireikað – projektmannagongdir, savnskipanir, arbeiðsamboð hjá projektbólkinum og stýrisbólkinum. Skjalaleistir (skabelónir) verða gjørdir.

### Kunning

Byrjanin snýr seg um at gera púra greitt fyri allari projektskipanini, hvat ið henda skal. Er projektið stórt, eigur tað at markerast onkursvegna. Allur ivi og spurningar verða viðgjørd.

Góð kunning og gjøgnumgongd av projektgrundarlagnum saman við projektbólkinum verður framd. Felagsfatan verður tryggjað um alt: mál og veitingar, uppgávur og ábyrgdir, váðar og tíðarætlanir.

### Endi

Hvussu stórt og hvussu torgreitt projektið er ger av, hvussu langur hesin teimurin er. Teinur 3 endar, tá ið farið verður undir at fremja projektið.

### Ábyrgd

Projektleiðarin hevur ábyrgdina av, at farið verður undir at fremja projektið. Stýrisbólkurin er settur, og formaðurin hevur eftirlit við arbeiðinum, sum avtalað.

STIGTØKA ◆ FYRIREIKING ◆ BYRJAN ◆ FREMJING ◆ ENDI ◆

## TEINUR 4: FREMJING (ÚTINNING)

Endamálið við teininum er at tryggja, at verkætlanin verður gjøgnumførd innan fyri avráddu karmarnar. Fylgt verður við tíðarnýtslu og peninganýtslu, og frávik frá ætlanini skulu takast upp við stýrisbólkin.

### Framleiðsla

Verkætlanin verður framd. Verkætlanarleiðarin leiðir toymið og samskipar alt arbeiðið sambært projektgrundarlagnum. Verkætlanarleiðarin skal eggja øllum í verkætlanarbólkinum.

### Fráboðan

Stýring og fráboðan fer at fylla nógv hjá verkætlanarleiðaranum. Javnt samband verður millum verkætlanarleiðara og eigara. Eru summar uppgávur ikki nóg væl útgreinaðar, verður tað gjørt, so hvørt betri innlit fæst.

At boða frá støðulýsing – bæði til verkætlanarbólkin og til stýrisbókin – er sera týðandi arbeiði hjá verkætlanarleiðaranum.

Er verkætlanin stór, kann vera skynsamt at loyva øðrum inn at skoða verkætlanina.

### Fráviksfráboðan

Virkin fráviksviðgerð hevur eisini týdning. Halda ætlanir ikki, er viðkomandi annaðhvørt at broyta málið, at broyta tíðarætlanina ella at fáa meira tilfeingi til verkætlanina.

Verkætlanarleiðarin boðar frá frávikum, og stýrisbólkurin tekur avgerðir um, hvat verður gjørt.

### Veitingar

Tá ið veitingarnar eru lidnar, verður skipað fyri góðkenning av teimum. Stýrisbólkurin er høvuðsgóðkenningarmyndugleiki.

### Ábyrgd

Verkætlanarleiðarin stýrir og leiðir, og skal eisini tryggja samskiftið bæði uppeftir og niðureftir. Verkætlanarleiðarin skal tryggja rótfesti og hevur fráboðanarskyldu til stýrisbólkin.

Stýrisbólkurin, sum umboðar eigaran, fylgir við og tekur støðu til broytingar. Verkætlanarluttakarar fylgja ætlanum og útinna arbeiðið, sum er teirra.

STIGTØKA ◆ FYRIREIKING ◆ BYRJAN ◆ FREMJING ◆ ENDI ◆

## TEINUR 5: ENDI

Verkætlanin er nú liðug, og úrslitið er klárt og raksturin byrjar. Endamálið við teininum er at tryggja, at rakstrarleiðarin tekur væl ímóti úrslitinum, at projektið verður liðugt og eftirmett.

### Veitingin

Verkætlanin er liðug og veitingin, sum skal hava ætlaðu nyttuna við sær, verður latin eigaranum. Antin er veitingin gjørd, sum upprunaliga ætlað, ella broytt eftir dagføringum, sum stýrisbólkurin hevur gjørt í projektgrundalagnum.

### Íverksetan

Verkætlanin er nú latin eigaranum. Tað, sum er ment, skal takast í nýtslu, og øll vitan flytast yvir. Allarhelst er tørvur á upplæring og tilrættislegging í organisatiónini hjá eigara. Slagið av verkætlan lýsir nærri, hvat fer fram her. Formlig góðkenningartíðarskeið kunnu vera viðkomandi.

### Eftirmeting

Ein týðandi partur er at eftirmeta. Eftirmetingin kann brúkast, tá aðrar líknandi verkætlanir verða settar í gongd.

### Ábyrgd

Stýrisbólkur og verkætlanarleiðari avgreiða skiftið í felag. Verkætlanarluttakarar fara burturúr, so hvørt sum tey hava avrikað sítt.

## VERKÆTLANARLEIÐSLUUPPGÁVUR

Projektleiðsluuppgávurnar vera eisini nevndar tilgongdir.

Ofta kemur bland ímillum teinar og tilgongdir. Ein teinur er virksemið millum tveir stórvarðar, og tilgongdirnar eru virksemi, ið eigur at vera framt í ávísari raðfylgju, soleiðis at eitt ávíst úrslit spyrst burturúr. Tað eru ítøkiligar uppgávur, ið projektleiðslan røkir so hvørt, sum projektið fer sína lívsgongd.

Fleiri tilgongdir fara fram á einum teini, ofta samstundis. Fleiri tilgongdir fara eisini fram tvørtur um teinar.

Tilgongdir byrja ella enda ikki altíð samstundis við stórvarðarnar í verkætlanini.

Fyritøkur og stovnar, ið fylgja skipaðum projektleiðslufrymlum hava ofta útgreinað háttalag fyri hvørja projektleiðsluuppgávu

- Vegleiðing, sum lýsir, hvussu gjørt verður út í æsir.
- Skjalaleistir (skabelónir) – hvussu høvuðsskjalið skal síggja út.
- Tøkni og onnur amboð, t.d. KT, um projektleiðslan skal gera útrokningar osfr.
- Minnislistar, ið vísa, hvat projektleiðslan skal minnast til.

Á næstu síðunum eru uppgávurnar lýstar.




## SETA MÁL OG STIGSKIPA MÁLINI

- Góð, mátilig og realistisk mál.
- Gera tað rætta – nytta í mun til tørvin.
- Rættar veitingar í mun til nyttuna.
- Veitingarmálini eru høvuðsmiðið hjá verkætlanarleiðara og grundarlagið hjá eigara at meta um gongd og úrslit.

Hetta er ein krevjandi tilgongd við framskygdum metingum og tulkingum.

Leiðslan tekur stigið, og seinni kemur verkætlanarleiðarin inn og setir ætlanina upp. Málini eru rótfest í verkætlanarstjørnuni – hvat skulu vit gera? Hvussu ítøkilig málini kunnu verða, veldst um projektslagið. Áhugalýsingin verður nýtt til at meta um tørvin og møguleikarnar at skapa neyðugu karmarnar.

At seta mál fyllir nógv í stigtøku og fyrireiking. Málini skulu helst vera staðfest og skjalførd í projektgrundarlagnum, áðrenn byrjað verður.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Orða nyttumál.
- Orða veitingarmál og vavið á verkætlanini.
- Veitingarnar eru tað, sum verkætlanin skal gera, og mugu kunna mátast.

Arbeiðsgongdin er endurtakandi, og tillagingar mugu verða gjørdar allar tíðina í mun til, hvat vit vænta, og hvat yvirhøvur ber til eftir tí sum karmarnir loyva.

Tá verkætlanin verður framd, kunnu tillagingar aftur koma fyri.

### Ábyrgdir

Ovasta leiðslan – eigarin – eigur uppgávuna. Verkætlanarleiðarar meta um, hvussu væl ætlanin ber til at fremja.

Verkætlanarleiðarar nýta veitingarmál til at útgreina øll ítøkilig úrslit, sum verkætlanin skal lata.




## ÁHUGALÝSING

- Stilla málini – hvat ynskja áhugafólkini og áhugabólkarnir?

- Áhugalýsingin er grundarlag undir váðameting.

- Áhugalýsingin er grundarlag undir rótfesti, skipan og kunning

- Áhugalýsingin er stýris- og uppfylgingaramboð, tá verkætlanin verður framd.

Byrjað verður beinanvegin at útvega neyðugt yvirlit í ráðleggingini. Áhugalýsingin gevur íkast til verkætlanarstjørnuna sum heild og váðametingina.

Áhugalýsingin fyllir nógv í stigtøku og fyrireiking.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Finna áhugabólkar. Kann vera neyðugt at flokka í mátiligar bólkar. Í geirar í samfelagnum (t.d. alment og privat). At býta størri organisatiónir í partar og deildir. Minsta eindin er einstaklingar.

- Meta um leiklutirnar hjá áhugabólkunum í mun til verkætlanina. Vanliga verður flokkað í tey, sum ávirka verkætlanina (sponsorar, luttakarar, myndugleikar), og tey sum vera ávirkað av verkætlanini (brúkarar o.o.).

- Meta um sjónarmiðini hjá áhugapørtunum, vitja áhugapartarnar og kunna um verkætlanina.

Ein góð áhugalýsing léttir nógv um kunningararbeiði, sum fylgir við – lýsingin kann brúkast beinleiðis sum samskiftisamboð og yvirlit yvir, hvør skal kunnast um hvat? Hvat var úrslitið av kunning og fundum?

### Ábyrgd

Ovasta leiðslan skal seta gongd á virksemið og tryggja, at tað verður gjørt. Verkætlanarleiðarin yvirtekur amboðið, tá hann er settur og dagførir síðani.




## VÁÐAMETING

- Stilla málini – hvørjir vandar síggjast?

- Váðametingin er grundarlag undir rótfesti, skipan og kunning.

- Váðametingin er stýrisamboð – alla tíðina hava eyguni eftir vandum og seta fyribyrgjandi tiltøk í verk.

Váðameting er ein ógvuliga skipað tilgongd.

Váðameting fyllir nógv í stigtøku og fyrireiking.

Váðameting er týdningamikil at brúka á stigtøku- og fyrireikingarteinunum. Váðametingin eigur altíð at vera partur av fráboðanini til stýrisbólkin. Váðametingin verður skipað sambært bygnaðinum á projektinum – eftir høvuðsmáli, partmáli osfr.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Finna váðar, hvat kann ganga galið? Ofta verða teir býttir í flokkar og í undirflokkar samsvarandi við verkætlanarstjørnuni – hvussu torgreidd er veitingin, fígging, tíðarætlan, skipan og leiðsla, undirtøka osfr.

- Meta um sannlíkindi fyri, at váðin verður veruleiki.

- Lýsa avleiðingarnar. Hvat hendir, um váðin verður veruleiki? Fáa ikki fígging, halda ikki tíðarætlan osfr.

- Rokna váðafaktor. Stór sannlíkindi samantvinnað við stórar fylgjur eru viðurskifti, lagt eigur at verða mest uppfyri.

### Ábyrgd

Ovasta leiðslan skal seta gongd á virksemið og tryggja, at hetta verður gjørt. Verkætlanarleiðarin yvirtekur amboðið, tá ið hann er settur og dagførir váðametingina.




## RÓTFESTI

- Tryggja verkætlanina á øllum økjum.

Rótfestið er í høvuðsheitum ein leiðsluuppgáva, ið er galdandi gjøgnum alla lívsgongdina.

Eigarin og stýrisbólkurin eiga at virka fyri at fáa undirtøku, fígging og at vera til reiðar at loysa trupulleikar. At ráðgeva og hjálpa verkætlanarleiðara í øllum lutum.

Tá ið verkætlanarleiðarin er settur, er samspæl millum hann og eigara um hetta yvirskipaða evni.

Amboðini til at tryggja rótfesti eru málini, áhugalýsingin og váðametingin. Fokus broytist í mun til gongdina. Fyrst at fáa eina góða byrjan, síðani at tryggja framhald og at komið verður á mál, og til endans, at veitingarnar verða brúktarar og at ætlaða nyttan fæst burturúr.

### Ábyrgd

Projektleiðarin.
Eigari og stýrisbólkur.

## LEIÐSLA

- Leiða verkætlanina á øllum økjum. Vísa veg, eggja til, loysa trupulleikar.

Virkin og sjónlig leiðsla er týdningamikil gjøgnum alla gongdina.

At verkætlanarluttakarar og høvuðsáhugapartur vita, hvør hevur ábyrgdina og kenna, at onkur situr og stjórnar projektheildini.

Leiðsla er meira yvirskipað hugtak enn stýring og aðrar meira tekniskar uppgávur. Leiðslan skapar lív, motiverar og vísir leiðina fyri øllum hinum.

Eigari hevur leiðsluuppgávur mótvegis verkætlanarleiðara og verkætlanini sum heild. Verkætlanarleiðarin er dagligur leiðari og vísir projektluttakarum vegin.

Ikki minst skal ovasta leiðslan taka stig, tá ið trupulleikar eru, hjálpa har tað ber til, taka truplar avgerðir osfr.

### Ábyrgd

Projektleiðarin.
Eigari og stýrisbólkur.




## SKIPAN

- Hvussu verður projektið skipað?
- Orða týdningamiklar leiklutir.
- Greiða ábyrgdarbýtið.
- Skipa góða arbeiðsgongd.
- Skipa leiklutirnar, so bland ikki kemur í.

Skipanin snýr seg um at finna semjur um leiklutirnar á eigarastignum og á projektstignum.

Høvuðsleiklutir, ið skulu mannast, eru eigari, ið skal vera ein navngivin persónur og projektleiðari, eisini ein navngivin persónur.

Arbeiðsbólkar, ið skulu vera eru: stýrisbólkur og projektbólkur. Projektslag og kompleksitetur geva annars ábendingar um neyðugar leiklutir í stýrisbólkinum. Vanligir leiklutir eru sponsorur, góðskustýring, veitaraumboð, umsiting og hjálp, umframt projektleiðari.

Tá ið projektleiðari er settur, hevur hann ábyrgdina av at lýsa leiklutir og starvsfólkatørv og fyrireika starvsfólkaupptøku (úr høvuðsstovninum ella uttaneftir).

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Finna eigara.
- Finna projektleiðara.
- Skipa stýrisbólk.
- Skipa projektbólk.

### Ábyrgd

Ovasta leiðslan í umhvørvinum, sum tekur stig til projektið, finnur eigara. Stýrisbólkur verður annaðhvørt settur av eigara, ella í samstarvi millum eigara og projektleiðara.




## PRAKTISK FYRIREIKING

- Tryggja góðar praktiskar karmar um projektið.
- Luttakarar hava pláss og útgerð til allar uppgávur, ið skulu fremjast.
- Projektið hevur praktiskar fortreytir at samansjóða seg væl við ytra umhvørvið.

Vanligi arbeiðsdagurin hevur nógv at siga fyri projektgongdina.

Serliga avbjóðandi kann tað vera, skal eitt projekt húsast undir somu lon, har rakstrarorganisatiónin heldur til, og um projektið er torgreitt. Umstøður snúgva seg um:

- Telduútgerð og ritbúnaður, ið eru neyðug til fakligu og projektumsitingarligu krøvini.
- Samskiftisamboð til projekt og áhugabólkar/samfelag.
- Hølisumstøður.
- Savnsskipan til verkætlanina.
- At sjóða saman projektmannagongdir við rakstrarmannagongdir á stovninum ella á stovnum, har projektið verður framt.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Kortleggja tørvin hjá júst hesum projektinum.
- Semjast við stýrisbólk og projektbólk um, hvussu farast skal fram.
- Keypa inn og innrætta.
- Førleikamenning um neyðugt fyri at tryggja, at allir partar eigari, stýrisbólkur og projektluttakarar trívast í nýggju projektheildini.

### Ábyrgd

Projektleiðarin skal tryggja, at umstøðurnar eru í lagi og samsvara við tað, sum møguligt er. Projektleiðarin skal hugsa um projektjáttaninina og búningarstigið í rakstrarumhvørvinum, har projektið skal fremjast. Eisini skal hann hugsa um førleikar og hugburð hjá projektluttakarum.

Semja við eigara og stýrisbólk um hesi viðurskifti eigur ikki at verða undirmett.




## STARTSKOTIÐ

- Tryggja eina góða byrjan sum heild.
- Allir luttakarar í projektinum kenna stóru myndina, kenna sín leiklut í heildini og eru fús at fara undir arbeiðið.

Alt er lagt til rættis og farið verður undir arbeiðssetningin. Í summum projektum er skiftið frá fyrireiking til fremjing flótandi, meðan markamótið er eyðsýndari í øðrum.

Tað er altíð týdningamikið at savna allar partar í hesum markamótinum fyri at tryggja felags stev og eggjan.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Fyrireiking – savna alt tilfar saman og kunna luttakarar um, at nú verður farið undir tilgongdina.
- Gjøgnumgongd av projektgrundarlagnum saman við stýrisbólkinum og projektbólkinum. Felagsfatan skal tryggjast um alt – mál og veitingar, uppgávur og ábyrgdir, váðar, tíðarætlan og arbeiðshættir.

### Amboð

- Projektgrundarlagið, ið er gjørt undir fyrireikingini.
- Framløgur og annað tilfar, ið er viðkomandi.
- Alt eftir projektstødd, høli og amboðum at tryggja gott úrslit.

### Ábyrgd

Eigarin umboðar projektið og skal seta átakið í ein heildarsamanhang. Eigarin skal vísa á týdningin av verkætlanini og geva seg sjálvan til kennar fyri projektluttakarum.

Projektleiðarin hevur alt tilfar og nágreinliga vitan um projektgrundarlagið. Projektleiðarin hevur praktisku ábyrgdina og skal tryggja, at tiltakið eydnast væl.




## SKOÐAN

- At styrkja tilgongdina, læra og fáa hjálp til tær avbjóðingar, ið eru.

- At spjaða vitan og royndir til onnur, um projekt-tilgongdina.

Projektskoðan snýr seg um at fáa onnur at hyggja eftir projektinum. Skoðan kann vera ein góður vani, og nakað, sum verður gjørt, hóast tað gongur væl. Í slíkum førum snýr skoðanin seg fyrst og fremst um at optimera, læra og breiða kunnleika.

Skoðan er enn meira viðkomandi, um projektið hevur avbjóðingar, ið eru truplar at loysa. Alt eftir hvør avbjóðingin er, kann ein skoðan hava við sær, at manglandi førleiki fæst til vega, og at projekt-leiðsluuppgávurnar vera styrktar við upplæring og amboðum, og eisini at eigari og projektleiðari fáa neyðuga innlitið til at taka stig til at umskipa verkætlanarstjørnuna.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Avgerð verður tikin um, at skoðan skal vera.

- Samstarvsfelagar verða funnir og ætlan løgd.

- Tilfar verður sent til skoðan (revisor): projekt-grundarlag og viðkomandi støðufráboðanir.

- Skoðan verður framd við vitjan og kanska arbeiðs-fundum við samrøðum osfr. Henda tilgongdin kann vera ógvuliga gagnlig.

- Skoðari ger frágreiðing og tilmæli.

- Úrslitið verður gjøgnumgingið í saman.

- Avgerðir verða tiknar um møguligar endurskoð-anir.

### Amboð

- Førleikayvirlit í umhvørvinum, og hvørjir skikkaðir skoðarar eru.

- Projektgrundarlagið.

### Ábyrgd

Verkætlanarleiðari skal útinna projektið og hevur samlaða yvirlitið. Best er, um eigari og projektleiðari semjast um at brúka skoðan, soleiðis at vilji er at gera broytingar seinni, um tað er neyðugt.




## ÚTGREINING

- Seta nágreiniligar ætlanir fyri, hvat ið verður gjørt fyri at røkka málunum.
- Høvuðsskrokkurin í projektgrundarlagnum verður gjørdur.
- Útgreiningin er stýrisamboð – at nýta undir undir verksetan. Hugt verður eftir veitingum, virksemi, tíðarætlan og fíggjarætlan.

Útgreining er ein ógvuliga skipað tilgongd.

Útgreiningin byrjar, tá ið málini gerast sjónlig og tekur dik á seg í fyrireikingarteininum. Projektleiðarin brúkar vanliga stóran part av fyrireikingini til hesa uppgávu.

Útgreining er kjarnin í uppfylging og stýring undir verksetanini.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Útgreina týdningamiklar varðar og undirveitarar.
- Útgreina virksemið.
- Snikka saman tíðarætlan.
- Gera neyva fíggjarætlan.

### Ábyrgd

Ovasta leiðslan leggur fyri við at lýsa verkætlanina í høvuðsheitum.

Tá ið verkætlanarleiðari er settur, stendur hann fyri tilgongdini og heldur fram at dagføra.




## STÝRING

- Fylgja við, hvussu gongur í mun til projektstjørnuna – veitingar, virksemi, tíðarætlan og fíggjarætlan.

- Frávik verða viðgjørd.

Stýringin er skipað tilgongd, sum byggir á projektgrundarlagið.

Allir partar skulu kenna løtustøðuna og vera fyrireikaðir til broytingar og gera tillagingar, tá broytingar verða gjørdar.

Stýringin byrjar, tá ið projektið er komið í eina fasta legu.

Stýringin verður í miðdeplinum, tá ið projektið verður framt, men kann eisini byrja fyrr, meðan fyrireikað verður, er projektið torgreitt. Í torgreiddum projektum kann fyrireikingin vera eitt projekt í sjálvum sær.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Støðug fráboðan til projektbólkin eftir fastari ætlan, og annars í mun til tørvin.

- Tíðarásett fráboðan til stýrisbólkin.

- Tillagingar í projektgrundarlagnum í mun til broytingar í kørmum, ið kunnu koma fyri.

- Neyv fíggjarstýring.

### Ábyrgd

Verkætlanarleiðarin hevur ábyrgdina at stýra og boða frá.

Eigari og stýrisbólkur taka støðu til frávik og hjálpa projektinum og laga til eftir broyttum kørmum.




## EFTIRMETING

- Staðfest verður, um tað eydnaðist at fullfíggja projektstjørnuna í samsvari við málini.
- Vóru veitingarnar, sum tær skuldu?
- Hildu fíggjarkarmarnir?
- Lærdómur frá tilgongdini sum heild fáast.

Verkætlanin endar við einari neyvari eftirmeting. Projektleiðarin tekur stig til eftirmetingina.

Projektleiðarin nýtir projektgrundarlagið sum útgangsstøði og tekur samanum við at sambera tað, sum hendi við ætlanini.

Tann skjalfesta vitanin er í áhugalýsingini, váðametingini, fundarfrágeiðingum, veitingarlýsingum og aðrari projektskjalfesting.

Projektleiðarin spyr eisini viðkomandi partar, hvat teir halda. Tað veri seg projektluttakarar, stýrisbólkur, sentralir veitarar og brúkarar.

### Tilgongdin í høvuðsheitum:

- Gjøgnumganga projektgrundarlagið.
- Gjøgnumganga projektskjalfesting.
- Spyrja partarnar og kanska senda spurnabløð út.
- Gera frágreiðing.
- Leggja frágreiðing fram fyri stýrisbólkin.

Nú endar projektið, men uppgávan er ikki heilt liðug enn. Eigari og leiðsla hava nú ábyrgdina av at fáa ætlaðu nyttuna burturúr.

Tað kann vera drúgv tilgongd, eftir at projektið er liðugt at fáa ætlaðu nyttuna burturúr.

### Ábyrgd

Projektleiðarin hevur ábyrgd at gera eftirmetingarfrágreiðing.

Eigari og stýrisbólkur gjøgnumganga tilfarið og nýta vitanina í projekthøpi í framtíðini.

Eigari og leiðsla gera ætlan fyri, hvussu nyttan fæst burturúr.

Føroya landsstýri
Mai 2014

www.tinganes.fo